# Sjálvstýrislistin í Eysturoynni klárur

**Sjálvstýrismenn eru nú klárir við sínum lista í Eysturoyar valdømi. Okkurt kent navn er á listanum**

UPPSTILLING
*Heri á Rógvi*

Løgtingsval er sett at vera 30. apríl, og fleiri av flokkunum eru bæði lidnir við uppstilling og valskrá. Glið er nú eisini komin á uppstillingina hjá Sjálvstýrisflokkinum, sum er klárur við sínum valevnalista fyri Eysturoynna. Á listanum er bæði kend og minni kend nøvn. Sámal Petur í Grund, Lasse Klein og Kári P. Højgaard eru millum nøvnini á listanunum, sum einans mannfólk er at finna á. Sjálvstýrisflokkurin fekk 708 atkvøður ella 11,7% av atkvøðunum í Eysturoynni við seinasta løgtingsval í 1998.

**Listin sær soleiðis út:**

Sámal Petur í Grund, Søldarfjørður
Lasse Klein, Saltangará
Kári P. Højgaard, Saltangará
Finnur Egholm, Eiði
Ditleif Eldevig, Fuglafjørður
Atli F. Hansen, Syðrugøta
Danial P. Hansen, Toftir
Kenneth Rasmussen, Saltangará

# Sjálvstýrið í Vágunum endurstovnað

**Sjálvstýrisflokkurin hevur tikið stig til at endurstovna Sjálvstýrisfelagið í Vágunum, og nú undan valinum fer felagið at vera sera virkið**

POLITIKKUR
*Stefan í Skorini*

Týsdagin varð Sjálvstýrisfelagið í Vágunum endurstovnað. Hetta varð gjørt á sjálvstýrisfundi, har formaður floksins Eyðun Elttør luttók.

Rósely R. Hansen úr Miðvági, sum varð vald í nevndina í felagnum, fegnast um, at felagið nú er endurreist, eftir at einki virksemi hevur verið í felagnum leingi. Hini í nevndini eru Jógvan Pauli Olsen úr Miðvági og Sólvá Thomassen úr Sørvági.

Ætlanin er, at felagið skal vera meira virkið komandi tíðina, og at virksemi í felagnum skal vera javnt alt árið við limafundum og ikki bara uppundir val. Komandi vikurnar verður sjálvandi gjørt nógv burturúr, og arbeitt verður við at manna ein lista.

Sjálvstýrisflokkurin hevur samstundis boðað frá, at hann setir nøsina upp eftir tveimum løgtingslimum komandi valskeið eins og undanfarna skeið.

Ása Olsen, formaður í Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag, sigur, at listin í Suðurstreymoy verður almannakunngjørdur í komandi viku. Hon sigur, at eingin trupulleiki hevur verið at manna listan, og at valevni ikki tróta. Listin er at kalla liðugur, men enn er okkurt smáting, ið ikki er komið uppá pláss.

Hon sigur, at flokkurin ætlar at stilla upp í øllum valdømum, har hann vanliga hevur havt valevnislista, og at flokkurin fer at hóra undan eftir rumblið, ið hevur verið í flokkinum.

– Umráðandi er hjá einum lítlum flokki at hava listar í øllum valdømum, tí hvør atkvøða kann vera avgerandi fyri eykavaldu tinglimirnar. Sjálvstýrisfólk skulu helst ikki velja aðrar flokkar, tí tey ikki hava møguleika at seta krossin við sjálvstýrið, sigur Ása Olsen.

# Nú byrjar fjarlesturin



*Handilsskúlin letur um vikuskiftið upp fyri einari nýggjum kapitlið, tá skjøtul verður settur á fjarlesturin í samstarvi við Robert Gordon University í Aberdeen*

**Tey lesandi, ið skulu byrja fjarlesturin innan leiðslu og fyrisiting, fóru ígongd við lesnaðin fríggjadagin og leygardagin. 130 fólk søktu, men pláss varð bert fyri teimum tjúgu**

ÚTBÚGVING
*Heri á Rógvi*

Fríggjdagin møttust tey tjúgu fólkini, ið skulu byrja sína master útbúgving innan leiðslu og fyrisiting. Útbúgvingin er úrslitið av samstarvi millum Føroya Handilsskúla og Robert Gordon University í Aberdeen. BP hevur fíggjað við parti av teimum pengunum, ið teir hava játtað at latið til førleikamenning.

Áhugin gjørdist nógvar ferðir størri, enn fyrireikararnir av fyrstan tíð høvdu torað at vóna. Heili 130 fólk søktu um tey 20 plássini, ið Handilsskúlin átti at geva út av.

Eftir at allar umsóknirnar eru viðgjørdar, so hava tey tjúgu upptiknu nú fingið boð um hetta, og klárt er at byrja.

Tey tjúgu fólkini eru helt um helt menn og kvinnur. Býtini millum alment og privat er eisini helvt um helvt. Størsti parturin av teimum nú lesandi eru úr Høvuðsstaðarøkinum. Fríggjadagin og leygardagin varð skipað fyri einum sonevndum innleiðsluskeiði, har nýggju næmingarnir fingu høvi at hitta hini og kunna seg um útbúgvingina. Útbúgvingin verður skipað sum trý ára fjarlestur, og hon gevur rætt til heitið master.

Lesið meira um evnið í Sosialinum í komandi viku.


## Bussferðir

### til Týsklands
**24.05. - 03.06.**
**í sambandi við at tað eru 62 ár síðani týskur kavbátur søkti sluppina "Union Jack"**





Íroknað prísin er:
Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4-koyggjukamari við WC/bað,
7 nætur á hotelli í Týsklandi, íroknað ½ vistarhald.
Hartil føroyskur bussur á allari ferðini og
atgongumerki til ymisku støðini vitjað verða á ferðini.

**úr 6.295,-**





### til Noregs
**17.06. - 26.06.**
**Vitjað verður m.a. í Gudvangen, Lærdal, Lillehammer, í Gudbrandsdalinum, í Lom, Geirenger, við Sognefjørðin, Balestrand og Bergen**

Íroknað prísin er:
Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4-koyggjukamari við handvaski,
7 nætur á hotellum í dupultkamari v. WC/bað, íroknað ½ vistarhald.
Hartil føroyskur bussur og ferðaleiðari.

**úr 5.995,-**



SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
e-mail: booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

team85




Valskrá Fólkaflokksins:

# Bíligari røktarpláss



*Fólkaflokkurin vil virka fyri bíligari loysnum á eldraøkinum.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Røktarplássin eiga at kunna gerast munandi bíligari í framtíðini enn áður, heldur Fólkaflokkurin, sum ynskir at gera størri broytingar til tað betra innan almanna og heilsuøkið næstu fýra árini**

LØGTINGSVAL
*Heri á Rógvi*

Fólkaflokkurin legði hósmorgunin fram valskránna hjá sær til komandi løgtingsval, 30. apríl. Fólkaflokkurin hevur evnað til ein snøggan og umfatandi faldara, har øll aðalmálini hjá flokkinum verða umrødd. Lítið og einki stendur at lesa um sjálvsstýri og fullveldi, men dentur verður heldur lagdur á vinnupolitikk. Almanna- og heilsumál ætlar Fólkaflokkurin heldur ikki skulu fara afturvið borðinum. Í Føroyum skulu føroyingar ráða, stendur at lesa millum ætlanirnar í valskránni.

### Røktarpláss

Rúna Sivertsen, løgtingskvinna, segði á fundinum hósmorgunin frá sjónarmiðum og ætlanum Fólkafloksins á almanna- og heilsuøkinum næstu fýra árini. Dentur varð lagdur á, at lata upp fyri alternativum røktarmøguleikum, sum kunnu gerast munandi bíligari enn tær, vit kenna í dag.

– Vit halda, at vit alternativum loysnum kunnu røktarplássini fáast fyri millum 300 og 400 hundraðtúsund krónur fyri hvørt í sambýlum, segði altso Rúna Sivertsen.

Tað varð lagdur stórur dentur á, at hesar uppgávur skuldu flytast meira og meira út til kommunurnar at umsita, tí kommunurnar kenna best tørvin sjálvar.

Rúna Sivertsen segði, at almanna- og heilsumál fara at verða raðfest rættiliga ovarlaga hjá Fólkaflokkinum næstu fýra árini. Hon nevndi m.a. eina døgnrøktarskipan, sum skuldi setast á stovn, eins og eftir-lønartrygging skuldi skipast.

### Lægri skatt

Fólkaflokkurin legði í tólvta tíma eitt uppskot fyri Løgtingið um at veita skattalætta. Hesum ætlar flokkurin eisini at virka fyri eftir løgtingsvalið, 30. apríl.

Óli Breckman segði á fundinum, at tann einstaki sjálvur dugir betur sjálvur at umsita tær krónur, ið hann sjálvur hevur forvunnið og sostatt eigur.

Eitt lægri skattatrýst vil geva fólki treys og trivnað. Harafturat gevur hetta allari tjóðini trygd, segði Òli Breckman, og minti um slagorðini, Treysti, trygd og trivni.

Føroya Banki aðalfund:

# Aftur gerandisdagur hjá alivinnuni

**– Eftir stóran menning og framburð hjá alivinnuni í 1999 og 2000 er nú aftur gerandisdagur hjá alivinnuni. Og ein heldur dapur gerandisdagur hjá nógvum alibrúkum, verður m.a. sagt í ársfrágreiðingini hjá nevndini fyri Føroya Banka. Ì somu frágreiðing verður eisini víst sterku støðu bankans samanborið við aðrar partar av danska fíggjarheiminum**

PENINGASTOVNUR
*Heri á Rógvi*

Leygardagin hevur Føroya Banki aðalfund. Í tí sambandi hevur nevndin fyri Føroya Banka skrivað sína árligu frágreiðing, sum viðger hornasteinarnar í virksemi bankans og føroyska búskapinum. Føroya Banki kundi vísa á eitt yvirskot áðrenn skatt áljóðandi 209,7 mió fyri árið 2001. Hetta er í sjálvum sær ikki meira enn árini frammanunda, men munurin er tann, at tær stóru afturføringarnar frá kreppuárunum eru við at verða lidnar, og roknað verður við, at hetta verður heilt leyst og liðugt í 2002.



*Tað gongur rættiliga væl hjá Føroya Banka, men nevndin mælir til varsemi*

Føroya Banki vísti í sambandi við roknskapin á, at solvensurin var frálíka góður hjá bankanum. Onnur tøl hjá Bankanum hevur rakstrarinntøkur fyri hvørja útreiðslukrónu, sum er ein heila krónu ella eini 65% hægri enn líknandi bankar í Danmark.

Í frágreiðingini verður m.a. nortið við støðuna hjá alivinnuni.

– Eftir stóra menning og framburð í 1999 og 2000 er nú aftur vanligur gerandisdagur hjá alivinnuni. Og ein heldur dapur gerandisdagur hjá nógvum alibrúkum, verður sagt í frágreiðingini.

– Nú er vandi fyri, at so nógv verður etið burtur av eginpeninginum, at tað verður torført ella ógjørligt at halda fram við at ala somu nøgdir sum í dag, stendur at lesa í frágreiðingini.

Í frágreiðingini verður mælt til varsemið.

– Vit hava lyndi til skjótt at gloyma, kanska serliga tey døpru minnini. Orsøk er til at hava ein ávísan ampa av, at nýtslan og íløgurnar í samfelagnum tykjast byggja á, at stóri búskaparvøksturin fer at halda fram, stendur altso at lesa í frágreiðingini.

### Líka fyri lógini

Føroya Banki hevur seinasta árið eisini ligið í sakarmáli við Fiskimálastýrið. Málið snýr seg um fiskiloyvi, ið Føroya Banki heldur vera flutt frá skipunum ólógliga eftir hesi hava verið í tvingsilssølu.

– Bankin heldur, at tað er sera óheppið, at bankin skal góðtaka, at ein reiðari, til skaða fyri sín lánveitara, frítt kann flyta fiskiloyvini, sum honum lystir. Og líka so óheppið má tað mestast at vera, at myndugleikarnir til skaða fyri reiðaran og hansara lánveitara, tilvildarliga kunnu taka aftur fiskiloyvini, sigur nevndin fyri Føroya Banka í frágreiðingini.

– Øll mugu vera líka fyri lógini. Tað kann ikki vera rætt, at ein lánveitari, sum hevur fingið fíggjað eitt skip við teimum rættindum, sum tað hevur, skal kunna koma í ta støðu, at myndugleikarnir bara kunnu taka aftur fiskiloyvið, tá skipið verður selt. Og tað kann heldur ikki gera nakran mun, um talan er um sjálvbodna sølu ella tvingsilssølu.


## Óhoyrt! Páskatilboð

4% føst renta

FIAT

BMW

Fígging av brúktum bili hjá

**Bilfríðkan**

www.bilfridkan.fo